# Einglarnir spæla Mozart - nú í fikkubók




**Skaldsøgan »Når engle spiller Mozart« er uppseld og verður nú endurútgivin sum fikkubók. Umleið triðingurin av upprunaútgávuni er seldur í Føroyum, og rithøvundurin Lisbeth Nebelong er ovfarin og glað, at eisini føroyingar hava tikið væl ímóti hennara fyrstu skaldsøgu**

BÓKAÚTGÁVA

Serliga fegnast Lisbeth Nebelong um, at nógv fólk hava vent sær beinleiðis til hennara við brøvum, teldupostum og sms'um og hava sagt sína hugsan um bókina, um persónarnar í bókini og um hetta, at bókin fer fram í Føroyum.

– Tað er ein stór gleði, tá ið fólk siga frá, at bókin hevur nomið við tey og sett ferð á týdningarmiklar tankar, sigur Lisbeth Nebelong.

Skaldsøgan er um eina kvinnu, sum eftir mong ár, á vitjan aftur til Føroyar hittir eina fortíð og ein ungdómskærleika, sum hon trúði, at hon langt síðani hevði lagt aftur um seg.

Ein skaldsøga um at velja og at velja burturfrá í lívinum, um kærleika, tónleik og politikk. Tað er eisini ein søga um tað norðurlendska og um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark fyrr og nú.

### Í Nunnuskúlanum

Lisbeth Nebelong er fødd í 1955. Hon er útbúgvin tíðindakvinna og Master of Public Management, MPM. Árini 1965 til 1967 búði hon í Havn og gekk í Skt. Frans Skúla. Seinni frá 1973-1974 kom hon aftur og arbeiddi sum vikarur í Nonnuskúlanum.

Sum fjølmiðlakvinna vitjaði hon Føroyar í 1980, 1985 og í 1989, og í 2000 skrivaði hon ritgerð um fullveldisgongdina í Føroyum. Í dag er hon rithøvundur og samskiftisráðgevi, og hevur millum annað havt skeið á Løgmansskrivstovuni um »At fá boðskapin fram«.

Seinastu tíggju árini hevur hon skrivað bøkur um privatøkonomi hjá fólki.

Når engle spiller Mozart er hennara fyrsta skaldsøga.

Fikkubókin verður at fáa í bókabúðunum fyrst í juli og kostar umleið 100 kr. Upprunaútgávan kostaði 201 kr.

Meira fæst at vita frá Lisbeth á lisbeth@nebelong.com telefon +45 39 68 32 98. Eisini ber til at venda sær til forlagið til Annemarie Elkjær, annemarie@elkjaeroghansen.dk telefon +45 45 85 7167.

# Summarsólstøður í Sandagerði

**Um viðrar verður jóansøkubál í Sandagerði mikukvøldið 23. juni kl. 19**

JÓANSØKA

Eins og undanfarin ár skipar Tórshavnar býráð fyri summarsólstøðum í Sandagerði.

Sum vant verður bál, røða og felagssangur á skránni.

Ingi Mohr, fyrrverandi býráðslimur, heldur røðuna í ár.

Sum vant endar tiltakið við at farið verður upp á sand við føroyskum dansi.

Tiltakið byrjar kl. 19 við ponyríðing fyri tey smáu. Bálið verður tendrað kl. 21 og søla verður av kakao og bollum.

Vanliga plagar nógv fólk at vera til tiltakið, sum býráðið hevur skipað fyri hvørt ár síðani miðskeiðis í 80-árunum.



# Føroyar - Russland 4-1

**Nú meðan EM fepurin herjar kring alt landið er tað væl hóskandi at nýta hesa yvirskrift, sum tó als einki hevur við fótbólt at gera men tónleik: á Summartónakonsertini í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 23. juni kl. 19.30 fer bólkurin Aldubáran nevnliga at spæla 4 føroysk verk og 1 russiskt**



KONSERT
*Tíðindaskriv*

**Føroyar 4:** Aftur í ár er ein frumframførsla við á skránni. Atli Petersen hevur skrivað eina horntrio, sum verður framførd á fyrsta sinni og hartil verður frramført eitt annað verk eftir Atla Petersen, Skðrák, sum er fyri allan bólkin. Fyrsta verk á skránni er Preludium og Marsjur eftir Kára Bæk fyri allan bólkin og hartil hevur Kári Bæk eisini skrivað verk fyri klaver og fagott, Humureske og Elergi, sum verður framført. Aldubáran hevur fyrr framført hesi verk, men tey tola væl at hoyrast aftur. Aldubáran er mannaður av 9 av teim fremstu klassiku tónleikarunum í Føroyum og hevur, síðani hon bleiv til í 1995, bílagt og frumframført hópin av verkum eftir føroyskum tónasmiðum. Hóast størsti denturin verður lagdur á at spæla føroyskan tónleik so eru útlendsk meistaraverk eisini ofta á skránni. Hesuferð er meistaraverkið úr Russlandi.

**Russland 1:** Russiska verkið sum er á skránni er Oktett eftir Igor Stravinsky og er hetta verk fyri eina blásara oktett við floytu, klarinett og tveimum fagottum, trompetum, og trombonum. Í hesum sambandi hevur Aldubáran fingið nakrar ungar og dugnaligar blásarar afturat sær at framføra verkið og yngsti maðurin er hin bert 14-ára gamli Heini Andreasen, sum skal spæla við Aldubáruni fyri fyrstu ferð. Heini gongur á Musikksúlanum og lærir trompet hjá Ken Jones. Hóast sín unga aldur, hevur Heini spælt við Føroya Symfoniorkestri tvær tær seinastu konsertirnar. Ken Jones hevur eisini verið lærari hjá fleiri av hinum blásarunum, sum skulu spæla saman við Aldubáruni, og teir eru Andras Olsen og Dávur Juul Magnussen, trombone, og Ólavur Olsen, trompet. Andras Olsen var á fyrsta sinni og spældi við Aldubáruni, tá ið tey frumframførdu verk eftir Trónda Bogasini og Edvard Nyholm Debess á Listastevnuni í fjørð. Andras gongur í løtuni á solistlinjuni á Musikkonservatoriinum í Keypmannahavn og hevur eisini verður í London á The Royal Academy of Music og nomið sær lærdóm. Dávur Juul Magnussen gongur í løtuni í 2. g á Hoydølum og nemur sær undirvísing á Musikkskúlanum og spælir annars við í Føroya Symfoniorkestri, Havnar Hornorkestri og ungdómsorkestri og hevur ætlanir um at søkja inn á tónleikakonservatorium í Danmark, Skotlandi ella Onglandi. Ólavur Olsen hevði eina væleydnaða framførslu av einari trompet concerto saman við Føroya Symfoniorkestri í mars mánað. Ólavur varð liðugur við útbúgving sína á Det Jyske Musikkonservatorium í fjørð summar og er nú fluttur heim aftur og starvast í løtuni sum lærari á Tórshavnar Musikkskúla. Eisini verður Christina Andersen við á fagot í hesum verkinum saman við Jógvan Zachariassen.

### Íblástur frá elskarinnuni

Stravinsky skrivaði verkið Octet í 1922 og er hetta eitt av hansara fyrstu sokallaðu 'neo-klassisku' verkum, sum er alt annað enn romantiskt men hevur íblástur frá barokktónleikinum. Stravinsky var fasineraður av ljóðlitunum hjá blásarunum og ynskti at umganga tað meira konventionellu ljóðmyndina hjá strúkiljóðførunum og hetta framgongur væl av verkinum, sum, sambært Stravinsky sjálvum, bleiv til í einum dreymi. Verkið er tilognað Veru de Bosset, (konu Ballets Russes sniðgevaranum Serge Soudeikine) sum gjørdist elskarinna Sravinskys stutt áðrenn verkið bleiv komponerað. Sjálvur sigur Stravinsky hetta um dreymin og verkið:

»Oktettin byrjaði í einum dreymi. Eg droymdi at eg var í einum lítlum rúmi umgirdur av nøkrum tónleikarum sum spældu vælljómandi tónleik. Eg kendist ikki við tónleikin, teir spældu og eg mintist einki til tónleikin dagin eftir tá ið eg vaknaði, men eg minnist tó mína trongd til at finna útav, hvussu nógvir leikarar spældu, og tá ið eg royndi at telja teir út frá dreyminum kom eg fram til átta leikarar, tvær fagottir, trombonir og trompetir og eina floytu og klarinett. Tá ið eg vaknaði kendi eg eina vælvild og gleði og byrjaði at komponera Oktettina, sum eg dagin fyri ikki so mikið sum hevði skonkt ein tanka. Oktettin varð skjótt skrivað. Fyrsti satsurin varð komponeraður fyrst, og síðani annar satsur, waltz, men eftir at hava komponerað annan sats helt eg, at hann egnaði seg væl til eitt tema við variatiónum. Tískil komponeraði eg "ribbons of scales" variatiónina, sum ein preludium inngang til allar hinar variatiónirnar. Tann síðsta variatiónin, "Fugato" er ein kulminatión av øllum, sum eg royndi at fáa fram í satsinum, og hetta er so avgjørt tann mest áhugaverda hendingin í allari oktettini. Hugskotið við fugato satsinum er, at temaið verður spælt í rotatión av ljóðførispørunum. Triðji satsurin vaks burturúr fugato-satsinum og er ætlaður at virka sum ein kontrast til hæddarpunktið av verkinum. Kanska eg hevði Two Part Invention eftir Bach í huganum meðan eg komponeraði triðja satsin. Verkið er tilognað Veru de Bossets«.

Konsertin hjá Aldubáruni í Norðurlandahúsinum mikukvøldið 23. juni hevur sostatt nógv spennandi at bjóða uppá við verkum, sum hava íblástur frá føroyska skðrákinum og russiskari elskarinnu, og har frálíku og royndu tónleikarar úr Aldubáruni spæla saman við ungum gávuríkum talentum. Og hóast Føroyar hava yvirvág bæði fyrra og seinna hálvleik so er hetta ein av teim fullkomnu leikunum, har øll vinna.

**Skrá:**
Kári Bæk: Preludium og Marsjur
Atli Petersen: Horntrio
Kári Bæk: Humureske og Elergi
**- steðgur -**
Igor Stravinsky: Oktett
Atli Petersen: Skðrák

**Leikarar:**
Sámal Petersen, violin
Øssur Bæk, violin
Mlina Fred, viola
Frederik Waage, cello
Andrea Heindriksdóttir, floyta
Kenneth Larsen, klarinett
Jógvan Zachariassen, fagott
Páll Sólstein, horn
Ólavur Jakobsen, gittar
Jóhannes Andreasen, klaver
Andras Olsen, trombon
Dávur Juul Magnussen, trombon
Ólavur Olsen, trompet
Heini Andreasen, trompet
Christina Andersen, fagott



# Kend nøvn á festivali í Klaksvík

**Í døgunum 12. til 15. august verður summarfestivalur í Klaksvík. Ein festivalur, har tónleikur verður settur í hásæti. Stór nøvn verða á skránni, og á tíðindafundi týsmorgunin varð greitt frá sjálvum tiltakinum**

FESTIVALUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Boney M verður millum stóru nøvnini á summarfestivalinum í Klaksvík, sum verður í døgunum 12. til 15 august*

**Klaksvík:** Eisini varð greitt frá, hvørjar ætlanir fyrireikararnir hava, og hvussu skráin fyri festivalinum fer at síggja út. Millum luttakandi tónleikararnar kunnu nevnast: Ken Hensley, sum er kendur úr bólkinum Uriah Heap, Boney M, Kjell Samuelsen, Hans Inge Fagervik, Gunnar Mikkelsen og Guðrun Sólja Jacobsen, umframt fleiri onnur kend føroysk nøvn.

Festivalurin byrjar hósdag og endar sunnudag. Allar dagarnar eru stór tónleikatiltøk á skránni.

Tað heilt stóra verður tó leygardagurin, har ein útikonsert verður á Vágsbøi við teimum størstu nøvnunum á festivalinum.

Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum til festivalin, sigur, at endamálið er at fáa norðoyggjar á Føroyakortið.

– Her hendir ikki so nógv annað gjøgnum summarið enn norðoyastevna, sum jú liggur heilt tíðliga á sumrinum, vísir hann á og heldur fram, at tá er tað einamest ítróttur, framsýningar og onnur tiltøk sum eru á skránni.

– Hetta er so ein roynd at fáa tónleikin settan á breddan, sigur hann.

### Ymisk tiltøk

Festivalurin byrjar sum sagt hóskvøld, og tá verður tónleikur á skránni í Atlantis. Fríggjakvøldið verður konsert í KÍ høllini.

– Hon verður kanska fyri tað mesta fyri tey ungu, men leygardagurin er tann heilt stóri dagurin, sigur Steintór.

Leygardagurin byrjar við, at Norðoya Sparikassi hevur stórt morgunmatarborð, og aftaná middag byrja konsertirnar. Tær halda so fram allan dagin og út á kvøldið. Alt endar so við einum stórum fýrverki. Eisini verður eitt stórt barnatiltak leygardagin, so ikki kann annað sigast enn, at leygardagurin býður upp á eitt sindur av hvørjum til ein og hvønn.

Sunnudagin verður so ein stór gospelkonsert í KÍ høllini, har millum onnur Sigrid Rasmussen og Kjell Samuelsen fara at syngja.

### Lagið er treytin

Føroyska veðurlagið er ikki kent fyri at vera tað besta, og mangan hevur tað verið serstakliga tvørligt hjá fyrireikarum, sum skipa fyri uttandura tiltøkum. Steintór heldur tó ikki, at hvussu festivalurin fer at eydnast, verður treytað av, hvussu veðrið verður.

– Eg vil heldur siga, at tað er treytað av, at lagið verður gott á fólki, sigur hann og flennir. Men so leggur hann afturat, at august mánaður mangan hevur víst seg at royndst væl í Klaksvík, og tí vóna fyrireikararnir, at tað fer at hilnast væl.

– Men um nú hann legst við landsynningi og regni, so hava vit møguleikan at flyta konsertina leygardagin inn í KÍ høllina, sigur Steintór.

Forsølan av atgongumerkjum til festivalin byrjar í komandi viku. Atgongumerki til stóru útikonsertina á Vágsbø kosta 250 krónur í forsølu.

Fyrireikararnir eru bjartskygdir og vænta nógv fólk til festivalin.

– Vit høvdu ikki farið undir hetta, um mótið til tað ikki var gott, sigur Steintór Rasmussen at enda.

# Ongantíð vandi á ferð

**Tyrlan hjá Atlantsflogi bar við svørðin í Mykinesi, tá ein hvirla tók í hana beint sum hon fór upp frá fríggjadagin. Flogskiparin Hans Erik Jakobsen sigur, at hann gjørdi av at fara aftur til Vágarnar við tyrluni av trygdarávum, og at ongantíð var nakar vandi á ferð**

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Hans Erik Jakobsen fleyg tyrluna hjá Atlantsflogi fríggjadagin, tá hon varð tikin av einari hvirlu, í tí hon skuldi fara uppfrá í Mykinesi. Hann sigur, at tað hevur sæð nakað nógv ógvusligari út, enn tað í veruleikanum var, og at ongantíð var nakar vandi á ferð*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

Tá tyrlan hjá Atlantsflogi skuldi fara úr Mykinesi fríggjadagin, var veðrið nakað óstøðugt í bygdini. Hvirlur vóru, og í somu løtu sum hon fór uppfrá, kom ein hvirla aftanífrá og niður yvir tyrluna. Hetta gjørdi, at hon ikki fór upp sum vanligt og tók í svørðin aftur.

Flogskiparin royndi sum best at koma burtur úr støðuni, og tað eydnaðist honum beinanvegin. Hann stýrdi tyrluni runt einaferð, men gjørdi so av at lenda aftur fyri at hyggja nærri at tyrluni, um hon hevði fingið skaða. Tað hevði hon, so frægt sum hann dugdi at síggja, ikki fingið, men í samráð við teknisku deild varð gjørt av, at tyrlan skuldi flúgvast aftur til Vágarnar til nærri kanningar. Síðani tók Hans Erik hina tyrluna og fór út aftur til Mykinesar eftir ferðafólkunum.

– Hetta varð gjørt av trygdarávum, tí vit eru bara flogskiparar, ikki mekanikarar. Vit mettu, at tað var betur at fáa eina gjølla kanning av tyrluni, sigur Hans Erik Jakobsen.

### Gerandisdagur í fjøllunum

Hans Erik Jakobsen sigur, at hetta er fyrstu ferð, at hann er komin út fyri slíkum undir ferðafólkaflutningi tey tíggju árini hann hevur flogið. Hesi tíggju árini er tað vorðið til einar 7.000 tímar, har hann hevur flogið.

– Hetta við hvirlum kann næstan sigast at vera gerandisdagur, tá vit eitt nú flúgva í arbeiðsørindum í fjøllunum. Tað kemst av, at vindurin er kraftigari uppi í fjøllunum, greiðir hann frá. So tí kann ikki sigast, at flogskiparin er óroyndur undir slíkum umstøðum.

Hann heldur fram, at teir vistu av veðrinum hendan dagin, og tí royndu teir at passa sær løðið til at fara uppfrá.

– Tað hevur uttan iva sæð ógvusligari út fyri tey, sum stóðu og hugdu at, enn fyri tey, sum vóru í tyrluni, ivast Hans Erik ikki í. Fólk, sum vóru í tyrluni, søgdu bara aftaná, at tað kendist ikki stórt øðrvísi enn ein lending, men sjálvandi vistu tey, at tað var ikki heilt rætt, tí tey vóru júst farin uppfrá.

### Júst sum til venjing

Á hvørjum ári eru tyrluflogskiparar frá Atlantsflogi í USA til simulatorvenjingar. Hans Erik sigur, at hesin tilburðurin var júst sum til venjingarnar.

– Vit hava vant slíkar hendingar fleiri ferðir, og tað var sum at sita í simulatorinum, sigur hann.

Tá slíkir tilburðir koma fyri, er tað vanlig mannagongd, at frágreiðing verður skrivað beinanvegin og latin Statens Luftfartsvæsen til metingar.

Hans Erik hevur somuleiðis verið í sambandi við myndugleikarnar.

– Har er ikki meira at siga um hatta. Tað var nakað óstøðugt veður, men ikki ringt at flúgva kortini. Og tað er júst sum við báti. Ein passar sær løðið til at fara uppfrá. Í hesum førinum kom ein hvirla nakað óvæntað, men so ger ein tað, sum gerast skal fyri at fáa tað í rættlag, sigur Hans Erik Jakobsen, flogskipari á tyrluni hjá Atlantsflogi.